# 2007

ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR



# ÍF – B68

**1. deild menn**

**Leygardagin 26. mai 2006  Kl. 17.00 í Fuglafirði**

HAVSBRÚN

TOYOTA

HARALDSEN -títt keyp-

P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 1 2007**

**Útgevari:**
**ÍF-fótbóltur**

**Ábyrgd**
ÍF-fótbóltur

**Blaðnevnd**
Steinbjørn í Lambanum
Rógvi Róin

**Myndir**
Ólavur Frederiksen,
www.fotboltur.com
Rógvi Róin

**Kápumynd**
Frá dystinum í
Gundadali í fjør móti
B36. (Mynd: Ólavur
Frederiksen)

**Prent**
Føroyaprent
tel 314555

**Uppseting**
Hannis Egholm
tel 311836

# TAÐ HALDA VIT

Vit halda, at ein leikskrá hoyrir til, tá ið tú ert til fótbólt; eisini um liðið ikki leikar í bestu deildini. Tí hava vit í ÍF fótbólti aftur í ár gjørt ein innsats, soleiðis at leikskráin kann koma út til heimadystirnar hjá besta liðnum hjá monnum. Hetta er 6. heimadystur okkara í ár, og fyrsta leikskráin. Hóast lutfalsliga seint at geva fyrstu leikskránna út, hildu vit tað verða upp á sítt pláss, at hon nú verður prentað til heimadystirnar. Bæði til tykkum áskoðarar at stytta um stundirnar, lýsararnar og stuðlarnar at bera sín boðskap og fótbóltsdeildina at fáa nøkur eyka oyru í kassan.

Hóast vit nú leika í 1. deild hevur ikki staðið á at fáa lýsarar í leikskránna; faktiskt hevur móttøkan verið sera góð. Og tað siga vit stóra tøkk fyri. Leikskráin, sum tú stendur við í hondini í dag, er ikki fullfíggjað, tí tað mangla nakrar lýsingar framvegis, umframt okkurt skrivað tilfar. Fulla útgávan verður klár til næsta heimadystin, sum verður leiktur leygardagin 16. juni ímóti FS Vágar 2004.

Vit eru í dag komin saman at hyggja eftir okkara besta mansliði í fótbólti, sum í dag skal royna seg móti B68, sum seinasta kappingarár – eins og vit – leiktu í Formula-deildini. Í fjør tá vit leiktu fyrsta dystin í móti toftamonnum, var talan um beinleiðis botndyst. So er ikki í dag. B68 er á 1. plássinum við 28 stigum og vit á 3. við 21 stigum. Tí kann væntast, at hetta verður ein góður og undir-haldandi dystur.

Vit í Fuglafirði vóna somuleiðis, at dysturin í dag fer at stytta frástøðuna upp til toppin, soleiði at hon bert verður hasi 4 stigini. Til hetta krevst, at vit vinna dystin. Tí hava leikararnir brúk fyri øllum stuðli, teir kunnu fáa.Vit fara tí at heita á allar áskoðarar ÍFs, sum í dag standa kring vøllin, um at hjálpa ÍF til sigurin. Rópið á lið okkara og gevið tí tykkara fulla stuðul. Við nógvum góðum áskoðarum verður uppgávan lættari.

Við vón um ein góðan og væl spældan dyst í Fløtugerði í dag og trý stig í okkara lut, tá dysturin er av.





**Dysturin í dag**

# Í dag telja stigini dupult!

Í dag er tað oddaliðið av Toftum, B68, sum er á vitjan. Vit hava leikt einaferð ímóti tofta-monnum í ár. Tað var í 4. umfarinum, sum varð leikt 14. apríl. Dysturin var á Toftum, og taptu vit ta ferðina 3-2, hóast vit vóru frammanfyri 0-2 í hálvleikssteðginum. Hetta tapið er helst høvuðsorsøk-in til, at B68 nú er heili 7 stig frammanfyri okkum. Tí mugu vit vinna dystin í dag, og harvið minka um frástøðuna til oddin. Í veruleikanum kann sigast, at stigini telja dupult í dag. Vinnur B68 strúka teir avstað frá okkum, og fara upp á 31 stig fyri 11 dystir, meðan vit tá hava 21 stig. Hetta má ikki henda!

Síðsta ár leiktu tofta-menn í Formuladeildini eins og vit. Vit leiktu 3 dystir landskappingar-dystir ímóti hvør øðrum í fjør. Vit vunnu ein dyst í Fuglafirði, taptu ein og leiktu ein javnleik á Toftum. Serliga lemjandi var ósigurin í Fuglafirði móti endanum av kapp-ingini, ið helst var enda-liga staðfestingin av niður-flyting okkara.

Í 2004 leiktu bæði liðini eisini í bestu deildini. Tá endaði dysturin í Fuglafirði við 1-1, meðan vit taptu 2-0 á Toftum. Hetta árið flutti B68 beinleiðis niður, meðan vit endaðu á einum 9. plássi. Í dag er støðan nøkunlunda tann sama sum í 2006 og 2004, bert tað, at nú dystast vit um ovastu plássini. – Enn eru tað toftamenn, sum eru

**Framhald á bls. 19**

HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

HYDRAULIKK-
SLANGUR

KJ Hydraulik er veitari av fyrsta floks hydraulikkslangum til kundar í Føroyum, Danmark, Íslandi, Hetlandi, Skotlandi og Norra.

Vit útvega allar hydraulikkslangur skjótt og væl. Slangurnar verða framleiddar á goymslum okkara á Kambsdali og í Havn.




Slangurnar fáast við 1-lags, 2-lags, 4-lags og 6-lags stálarmering. Støddir eru frá 3/16" til 2".

DNV

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

**Kambsdalur:** 530 Fuglafjørður **Tórshavn:** 110 Tórshavn · Mykinesgøta 3
Tel 444 170 · Faks 444 265 · info@kj.fo · www.kj.fo

P/F Petur Larsen
Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco


TOYOTA
AURIS
Kom og royn tann nýggja Auris. Prísir úr kr. 215.000
REYNI SERVICE"


90°
75°
www.hh.fo
BYGGIRÁÐ
TIMBUR . AMBOÐ . INNBÚGV
-alt á einum stað!
BURHANDILIN
Runavík Tel. 477272 . Fuglafjørður Tel. 444126 . Klaksvík Tel. 455149


opið er soleiðis:
mánadag-fríggjadag 18.00-23.00
leygardag 17.00-23.00
sunnudag 09.00-10.30 og 14.00-23.00
altíð nýbakað breyð
hot dog
høsnarungaspjót
kúluís
KIOSKIN HJÁ BASSA

# Meg minnist !

Í hesum teigi, sum vit hava valt at kalla "Meg minnist" fara vit at leita upp fyrrverandi ÍF´arar, fara at siga teirra ÍF-søgu og eitt sindur um lív teirra nú.



Gesturin, ella fyrrverandi ÍF´arin í dag, er ein kendur skoðari, tó ikki á vøllinum. Tað er

## Leivur Harryson landsgrannskoðari

**Føddur**
Í Fuglafirði í 1954

**Byrjaði at leika við ÍF**
Eg byrjaði at leika við ÍF frá smádreingi av, leikti við piltunum, dreingjunum og síðani við ungligunum.

**Á besta liði fyrstu ferð**
Spældi á besta liðnum fyrstu ferð í 1971. Tað var fyrsta árið, ÍF spældi í meistaradeildini, sum nú ber heitið formuladeildin.

**Dystir og tilburðir eg minnist**
Eg minnist serliga eina suðuroyarferð í juni 1975, tá vit spældu móti VB í Vági í steypakappingini (Ísafjarðarsúlan). Vit fóru til Suðuroyar fríggjadag. Vit spældu dagin eftir og vunnu. Sama morgun byrjaði "útróðrar¬verkfallið", har bátar forðaðu strandfaraskipunum at leggja at. Vit sluppu tí ikki norður afur fyrr enn týsdagin, tá vit lupu í land av Dúgvuni í Kollafirði.

**Leikarar eg minnist best**
Av verjuleikarum minnist eg serliga Herman Midjord, ið leikti framúr væl í miðverjuni. Av álopsleikarum kann eg nevna bóltsnillingin Sam Jacobsen, og Jákup Frants Larsen, ið ofta fekk mál, tí hann rann óvanliga skjótt.

**Venjarar mær dámdi**
Venjarastøðan tá í tíðini kann als ikki samanberast við støðuna í dag. Vit vandu mest sjálvir í yngru deildunum. Fyrsti rættiligi venjarin, eg minnist, var íslendingurin Ørn.

**Fótbóltur aftaná ÍF**
Eg fór til Danmarkar at lesa í 1975, og spældi fótbólt niðri við føroyska ítróttarfelagnum ÍF Føroyar. Nú á gamalsaldrinum royni eg at renna regluliga, og spæli fótbólt saman við javnaldrum hvønn leygarmorgun. Inni um veturin og úti um summarið.

**Lærdómur, familja og lívið**
Eg varð liðugur sum cand. merc. í grannskoðan í 1982. Síðani havi eg arbeitt sum grannskoðari í Danmark og í Føroyum, var tó eitt skifti lærari á Føroya Handilsskúla. Eg giftist í 1979 við Rannvá, og vit eiga børnini Heina, Gutta og Hjørdis. Vit búgva nú í Tórshavn, men eg vitji javnan heimaftur til barndómsheimið í Fuglafirði.

**Børn og ítróttur**
Okkara børn hava íðkað nógvan ítrótt: fótbólt, hondbólt, svimjing, rógving og fimleik. Tað hevur ment tey nógv bæði til likams og sálar. Mær er fortalt, at ÍF-venjarar í yngru fótbóltsdeildunum leggja stóran dent á, at ungu leikararnir bera seg høviskliga at á vøllinum, bæði tá ræður um við- og mótleikarar. Tað er at fegnast um. Ein góður ítróttarandi er ein tann besta íløgan í ungdómin.

**Fótbóltur í dag**
Fótbólturin í dag er á nógv hægri støði, og er tað helst tí, at vit hava fleiri venjarar við útbúgving, og venjingin er nógv betri skipað líka frá ungum árum. Men ov harðligt spæl og ljótur málburður hoyrir als ikki heima á einum fótbóltsvølli.

**Góð ráð til ÍF:**
Eg eri neyvan førur fyri at geva ÍF nøkur ítøkilig ráð. Í einum ítróttarfelagi, eins og í øðrum feløgum, er tað ein stór uppgáva at raðfesta pening og orku. Persónliga haldi eg, at tað hevur stóran týdning at raðfesta yngru deildirnar



høgt við venjarum og góðum umstøðum, soleiðis at bæði teir góðu og minni góðu leikararnir fáa hóskandi avbjóðingar og kenna seg væl. Heldur eitt gott lið í 1. ella 2. deild við góðum ungdómsarbeiði, enn eitt dýrt lið í formuladeildini, ið gongur út yvir ungdómsarbeiðið.













# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo

# Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876

fk

**Fuglafjarðar Keypsamtøka**

Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

## Fuglafjarðar Træsmiðja

**Snikkaraarbeiði**
- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

**Fuglafjarðar Træsmiðja**
við Jóhan Larsen

## Piddasahandil og Ribarhús

listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«

opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27



hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði

*P/f Sveisingahandilin*

Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909

## SANDGREVSTUR P/F

Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

**Koyring við kranalastvognum fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)**

**tel 444121 • 595900 • 595910**

we make fishing more profitable

**Vit framleiða og umvæla:**

- Rækjutrol
- Botntrol
- Flótitrol
- Semi-pelagisk trol
- Snurpunótir



**Vit framleiða ta nýggju skiljiristina til:**

- Pelagiskan fiskiskap

**Vit framleiða og umvæla nótir til alivinnuna umframt:**

- Vaska og impregnera nótir
- Veita komplettar fortoyningar

**Vit hava útgerð til trol, nótir og alivinnuna á goymslu**

**VÓNIN**
www.vonin.com

Vónin Ltd.
P.O. Box 19
FO-530 Fuglafjørður
Tel – 298 47 42 00
Fax – 298 47 42 01

Vónin Tórshavn
Vestara Bryggja 12
FO-100 Tórshavn
Tel – 298 35 43 91
Fax – 298 31 33 19

## POUL JOENSEN
AVSKERING AV SKRÚÐUM

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95

- Avskering av skrúðum
- Myndaupptøka
- Videoupptøka
- onnur smá arbeiði



## BERGFROST
COLD STORAGE

P.O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 474 646
Fax +298 474 647
Mobile +298 223 667
bergfrost@bergfrost.com

## POUL JOENSEN
LAST & KRANAVOGNSKOYRING

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað





FRUMSÝNING

## ACTYON

pers 308.056 v/mvg
van 264.214 v/mvg



## SSANGYONG

Spildurnýggi Actyon borgar fyri nýskapandi sniðgeving, tí nú snýr tað sum ein einastandandi sportscoupé við SUV-eginleikum. Innrættaður við svørtum designaraelementum, stylaður við kromi og leðurratti, veitir hann meinlíkar upplivingar í tráð við sports- og coupébilar, sum er nakað heilt nýtt innan SUV-heimin. Samstundis veitir smarta SUV-sniðið fullkomna koyrivælveru umframt eitt sera hent vørurúm. Actyon fæst við 2.0 Commonrail dieselmotori, ið veitir 141 hestar og hevur eit moment uppá 310 Nm. Hann megnar at sleipa ikki minni enn 2,1 tons, so eingin trupuleiki er at fáa rasarabátin við uppá krókin. Minnst til at sjálvt standardútgerðin er full av útgerð millum annað ESP, ARP, HDC, ABS, ABD, ektað 4x4, dubult airbags, gardin airbag, útvarp/fløguspælari og el-síðuspegl. KOYR ACTYON, SKIL TEG ÚT.

LUKSUS
4WD

SSANGYONG
www.ssangyong-faeroerne.dk




| KYRON CURIOUS | REXTON II | RODIUS |
|---|---|---|
| pers 324.849 v/mvg | pers 403.294 v/mvg | pers 319.258 v/mvg |
| van 248.089 v/mvg | van 296.979 v/mvg | |

## BILVERKSTAÐIÐ

v/Hans Jacob Kollsker Á Hjalla Tel 311013 Fax 321015 www.kollsker.com

# Lastvognskoyring



Øll lastvognskoyring verður gjørd

**Kári Zachariassen**

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245




SKIPASMIÐJAN

www.faroeyard.fo

Sp/f **Jan Mohr**
Byggivirkið

Tlf: 21 99 49 • 21 89 49

# URTAGARÐURIN



V/RITU LARSEN
TEL.: 22 38 12

PROLAKK — FØROYA MEST FRAMMKOMNI PLÁTU- OG LAKKERINGSVERKSTAÐUR —



PROLAKK
Í februar 2007 byrjaði Prolakk sítt virksemi í nýggjum hølum hjá P/F Bilasøluni við Vegnum Langa í Hoyvík. Eyðkenni við Prolakk verður at veita eina dygdargóða tænastu, við framkomnari tøkni har kundin er í hásæti. Skjótt og væl úr hondum greitt arbeiði verður eyðkenni hjá fyritøkuni.

Verkstaðurin heldur til í sera snotiligum hølum við framkomnum amboðum. Í felagnum starvast fólk við sera drúgvum royndum, sum hava nógv ár á baki innan plátu- og lakkeringsarbeiði. Eisini nýtur verkstaðurin einans umhvørvisgóðkent tilfar.

Hevur tú tørv at fáa skaða gjørdan, tryggingarskaða ella skaða yvirhøvur, set teg í samband við okkum, so sýna vit bilin eftir avtalu.

www.prolakk.fo
prolakk@prolakk.fo

SP/F PROLAKK • VEGURIN LANGI • 110 TÓRSHAVN • POSTSMOGA 1393 • TLF.: 311252 • FAX: 311253



FINNUR FRÍÐI • FD 86



TRÓNDUR Í GØTU • FD 175

**P/F VINNAN**
**GØTU**




KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI
INFORMATION OFFICE

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*
*Mánadag - fríggjadag* *kl. 9-12 og 13-17*
*Leygardag* *kl. 9-12*

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður • Telefon 444388


**Framhald frá bls. 3**

omanfyri á stigatalvuni. Hetta broytist ikki í dag, men vit kunnu – sum sagt – við einum sigri í dag ota okkum nærri toftamonnum í toppinum.

Til dystin í dag eru so gott sum allir leikarar tøkir. Aleksander var ikki við ímóti SÍ síðsta vikuskiftið, men hann er klárur til dystin í dag. Hvør uppstillingin verður, er torført at meta um, men hugsast kann at hon verður nøkunlunda tann sama sum í Sørvági. So er bara spurningurin um venjararnir velja at lata Aleksander vera við frá byrjan. Ein annar spurningur er, um venjararnir seta Bartal í álopið ella í verjuna. Hetta kunnu vit bara hava okkara gitingar um.

B68-liðið hevur higartil í ár víst, at teir hava eitt sera sterkt lið, og hava enn nærum ikki havt trupulleikar ímóti øðrum liðum, enn okkum á Toftum. Teir hava eisini vunnið 9 dystir, leikt ein javnleik og ongan dyst tapt, og málúrtøkan er +26 mál. Tað sigur ikki so lítið um styrkini hjá teimum. Teir hava eitt væl kempandi lið, samansett av fleiri royndum leikarum og nøkrum lutfalsliga ungum, minni royndum, men evnaríkum leikarum. Tað sum sermerkir liðið er, at ALLIR kempa fyri sakini.

Hjá toftamonnum er torført at nevna nakran leikara framum nakran, tí teir hava somikið góða samanseting av leikarum. – Øssur Hansen, Arnbjørn Danielsen, Jann Ingi Petersen, leikandi venjarin og veteranurin Rúni Nolsøe, toppskjúttarnir Jósup Henriksen og Alexandro Castilho og fleiri aðrir. Teir báðir síðstnevndu hava skotið heili 15 mál í 10 dystum, so vit fara hervið at heita á okkara verjuleikarar at hava eitt vakið eyga við hesum báðum málrevunum, sum ikki skulu hava nógv pláss frammanfyri málinum. Okkara menn er heldur ikki fyri “nothing”. Vit hava ein sterkan hóp, í øllum førum í 1. deildarhøpi. Tó hevur liðið alt ov sjálvdan megnað at funnið tað poleraða fótbóltsspælið fram, sum fuglfirðingar hava verið kendir fyri. Men tær ferðirnar tað hevur gingið eftir vild, hava mótstøðuliðini verið “feiðað” av vøllinum. Vit kunnu nevna stórsigrarnar ímóti SÍ og B36, samstundis sum partar av summum dystum, eitt nú á Toftum, hava vit víst sera gott spæl. Ein av trupulleikunum er, at í tøttum dystum ímóti betru liðunum, megna hesi ofta at skora ímóti okkum síðstu minuttirnar. Bæði ímóti B68 á Toftum og TB á Tvøroyri lata vit mótstøðuliðið fáa mál seinastu minuttirnar – á Tvøroyri enntá í yvirtíðini. Tá ið vit hava fingið stýr á hetta, fara vit at vinna enn fleiri dystir.

Vit fara til dyst í dag við sera góðum vónum, og ætla at tryggja okkum trý stig í kappingini at røkka bestu deildini aftur. Drívið á dreingir; vit vilja síggja formulafótbólt aftur í Fuglafirði komandi ár.








Jørleif Petersen

*málarameistari*

Fuglafjørður

tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!









**Rasmus Joensen**

Málarameistari

530 Fuglafjørður

Tel. 444 139 - 214139



SPEKT statsaut. revisorar spf,
spekt@spekt.fo, www.spekt.fo

SPEKT statsaut. revisorar

# ÁRSINS ÍF-ARI 2007

## Andràs bestur í í 2006

Kappingina um at gerast ársins ÍF´ari í fjør vann málverji okkar, Andràs Gàngo. Hann hevði íalt 236 atkvøður.

Honum á baki komu brøðurnir Símun og Hanus Eliasen við ávíkavist 160 og 153 atkvøðum. Fyri at gerast ársins ÍF´ari 2006 fekk Andràs 1.000,00 kr., meðan nr. 2 og 3 fingu 500,-. Umframt hetta fingu teir allir prýðislut, sum Fa. Eilif Arge í Klaksvík hevði latið.



Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### Ársins ÍF´ari 2006 – støðan:

| Leikari | Stig íalt |
|---|---|
| Andràs | 236 |
| Símun | 160 |
| Hanus | 153 |
| Aleksander | 93 |
| Bartal | 82 |

## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskapp-ingardystunum í ár




Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðu-seðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-B68, 26. mai 2007

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________



## STØÐAN 1. DEILD - 25. MAI

| | Lið | D | V | J | T | V - T | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | B68 (n) | 10 | 9 | 1 | 0 | 33 - 7 | 28 |
| 2. | FSV04 | 10 | 8 | 1 | 1 | 23 - 9 | 25 |
| 3. | ÍF (n) | 10 | 6 | 3 | 1 | 28 - 9 | 21 |
| 4. | LÍF | 10 | 4 | 1 | 5 | 23 - 17 | 13 |
| 5. | NSÍ (u) | 10 | 4 | 0 | 6 | 18 - 22 | 12 |
| 6. | TB | 10 | 3 | 2 | 5 | 13 - 10 | 11 |
| 7. | SÍ | 10 | 3 | 1 | 6 | 13 - 21 | 10 |
| 8. | HB | 10 | 3 | 1 | 6 | 12 - 24 | 10 |
| 9. | KÍ | 10 | 3 | 1 | 6 | 12 - 25 | 10 |
| 10. | B36 (u) | 10 | 1 | 1 | 8 | 7 - 39 | 4 |

## LEIKARAHAGTØL 1. DEILD 2007

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | András Gango | 900 | 10 | - | - | - | - | (9) | |
| 2 | Áki Petersen | 846 | 10 | 2 | - | - | - | - | |
| 3 | Tórður Lervig | 669 | 9 | 4 | 1 | 1 | - | - | |
| 4 | Nenad Saric | 886 | 10 | 1 | - | 1 | - | 6 | |
| 5 | Elvan Taser | 770 | 10 | 3 | 1 | 1 | - | 2 | |
| 6 | Bartal Eliasen | 610 | 8 | 1 | 1 | 2 | 1 | 6 | |
| 7 | Aleksander Jovevic | 515 | 7 | 4 | 1 | - | - | 2 | |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 630 | 7 | - | - | 2 | - | - | |
| 9 | Amin Fallah | 498 | 9 | 4 | 2 | - | - | 2 | |
| 10 | Atli Petersen | 548 | 10 | 3 | 6 | 1 | 1 | 4 | |
| 11 | Frank Poulsen | 720 | 10 | 2 | 2 | 1 | - | - | |
| 12 | Árni Petersen | 643 | 8 | - | 1 | 2 | - | 1 | |
| 13 | Dánjal Pauli Højgaard | 177 | 4 | 1 | 2 | 1 | - | 2 | |
| 14 | Jan Ellingsgaard | 73 | 4 | - | 5 | - | - | 1 | |
| 15 | Heri Nesá | 360 | 4 | - | - | 1 | 1 | - | |
| 16 | Emil Toftegaard | - | - | - | - | - | - | - | |
| 17 | Høgni Zachariassen | 900 | 10 | - | - | 1 | - | - | |
| 18 | Vincent Jacobsen | 151 | 4 | 1 | 3 | - | - | 2 | |
| 20 | Uni R. Petersen | 4 | 1 | - | 1 | - | - | - | |
| 22 | Eyðun Madsen | - | - | - | - | - | - | - | |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

### Aðrir dystir í 1. deild í dag – 11. umfar

LÍF - NSÍ
HB – B36
FSV04 – SÍ
TB –KÍ *(leiktur 28. mai)*

### Dystir í 1. deild leygardagin 9. juni – 12. umfar

TB - LÍF
HB – ÍF
FSV04 – B68
B36 – NSÍ
KÍ – SÍ

### Dystir í 2. deild mánadagin 28. mai – 6. umfar

EB/Streymur – B68
MB – ÍF
GÍ – Skála
FSV04 – Fram
B36 – KÍ

### Málskjúttar 1. deild

| | |
|---|---|
| Stretowicz, FSV2004 | 10 |
| Jósup Henriksen, B68 | 8 |
| Alexandro Castilho, B68 | 7 |
| Bartal Eliasen, ÍF | 7 |
| Jørgen Meitilberg, SÍ | 7 |
| Radinovic-Panic, FSV2004 | 6 |
| Adrian Joensen, LÍF | 6 |
| Nenad Saric, ÍF | 5 |
| Andrias Lava Olsen, LÍF | 5 |
| Sonni L. Petersen, NSÍ | 5 |

### VERT AT VITA

Dysturin í dag er 6. heimadystur okkara í ár. Hagtølini í teimum 5 undanfarnu eru góð. -Fýra sigrar og ein javnleik. Málúrtøkan er 18-3. Fyrsti dysturin móti B68 í ár var á Toftum í 4. umfarinum. Tá vunnu toftamenn tepurt 3-2 eftir at vit høvdu verið á odda 0-2. Í Formuladeildini síðsta ár leiktu vit tríggjar ferðir ímóti B68. Tvær ferðir í Fuglafirði og eina ferð á Toftum. Vit vunnu annan dystin í Fuglafirði og taptu hin, meðan dysturin á Svangaskarði endaði 1-1. Sostatt er lagt upp til ein spennandi dyst í dag.

Næstbesta liðið hjá okkum leikar mánadagin ímóti MB í Miðvági. Úrslitini higartil hava verið á eini leið. Tveir sigrar, ein javnleikur og tvey tap. Sostatt hevur liðið 7 stig eftir 5 dystir og er nr. 5 í deildini.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1 Andràs Gàngo
2 Áki Petersen
3 Tórður Lervig
4 Nenad Saric
5 Elvan Taser
6 Bartal Eliasen
7 Aleksander Jovevic
8 Fritleif í Lambanum (liðsk.)
9 Amin Fallah
10 Atli Petersen
11 Frank Poulsen
12 Árni Petersen
13 Dánjal Pauli Højgaard
14 Jan Ellingsgaard
15 Heri Nesá
16 Emil Toftegaard
17 Høgni Zachariassen
18 Vincent Jacobsen
20 Uni R. Petersen

**Venjari:**
Jón Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Roy Róin
Símun Eliasen
**Liðleiðarar:**
Símun Fornagarð
Dia Jacobsen

## B68-LIÐIÐ

1 Gunnar á Steig
2 Alex Troleis
4 Arnbjørn Danielsen (liðsk.)
5 Ovi Magnussen
6 Kári Hansen
7 Øssur Hansen
8 Kristian A. Andreassen
9 Rúni Nolsøe
10 Jann Ingi Petersen
11 Alexandro Castilho
12 Petur M. Magnussen
14 Dánial Hansen
16 Mortan Hansen
18 Bogi Petersen
20 Jósup Henriksen
21 Henning Joensen

**Venjari**
Rúni Nolsøe
**Hjálparvenjari**
Ingolf Petersen
**Hjálparfólk**
Robert Hansen
Hans H. Johannesen
Jan Andersen

**Eingin ásettur áðrenn evstamark**

**PETUR LARSEN**